## Eingin provokatión



- Hetta var eingin provokatión! Vit hava leingi roknað við, at sendarin fór, og hava eisini tosað um, hvat vit skuldu gera, um vit komu í hesa støðuna! Tað sigur Jógvan Jespersen, stjóri í Kringvarpi Føroya, við Rás2, eftir at hann í gjárkvøldið tók avgerð um at strika sjónvarpsskránna hjá Kringvarpi Føroya. - Vit kunnu ikki gera við, at politiskararnir hava raðfest hetta málið so lágt, hóast vit ferð eftir ferð hava víst á trupulleikan, sigur kringvarpsstjórin. Rás2 royndi at fáa Jógvan Jespersen í útvarpsstovuna, men hann vil ikki gera beinleiðis viðmerkingar til Rás2: - Ringir tú nú frá Føroya Tele? spurdi kringvarpsstjórin, tá Rás2 vildi vita, hví Kringvarpið ikki helt fram at senda, eftirsum tey vóru nógv, sum kundu havt sæð sjónvarpið, hóast brekið í antennuskipanini. -Eg tími ikki at stilla upp til hatta. Nú er so lítil tíð eftir hjá mær í starvinum, so tað tími eg ikki, segði Jógvan Jespersen við Rás2.

-Elin W.P.

# Jespersen sløkti

**Hóast partur av Havnini og allir Televarpskundar kundu taka signal frá Sjónvarpinum, valdi Kringvarpsleiðslan at strika alla skránna í gjárkvøldið. – Tað gav ikki meining at senda, tá øll ikki kunnu taka ímóti, sigur kringvarpsstjórin**

SJÓNVARP
*Jákup Mørk*
*jakup@sosilalurin.fo*

Tað var nú ikki tí, at tilfar vantaði til sjónvarpssendingar mánadagin. Nýtt landsstýri var skipað fyrr um dagin, og á Flogvøllinum var veldugt mótashow gjá Guðrun & Guðrun.

Ivaleyst vildu hesi verið millum yvirskriftirnar í Degi og Viku, har Høgni Hoydal og Jørgen Niclasen stóðu til reiðar við kjakborðið. Men hvørki tíðindasendingin ella 3-2 sendingin, sum er fastur táttur mánadag, komu nakran tíð í luftina.

### 44% og alnetið

Hóast høvuðssendarin á Húsareyni ikki var virkin, so merkti hetta ikki, at eingir móttakarar vildu verið til signalið úr Vørsluni. Sendarin, sum beitir signalið niðan til høvuðssendaran á Húsareyni var framvegis virkin, og tí kundu hampuliga nógv húsarhald í Havn framvegis taka signalið.

Og sami sendari er eisini føðilið til Televarpið, har kundarnir framveigs sóu signalið frá Sjónvarpi Føroya. Men tað var so bara pausumyndin, sum var síggja á skíggjanum.

Televarpið upplýsir, at tey hava nakað oman fyri 7.000 kundar, og tað merkir, at á leið 40% av føroysku húsarhaldunum høvdu sæð Sjónvarpið, um sendingarnar altso fóru í luftina. Hartil verða sendingarnar hjá Sjónvarpinum eisini lagdar út á heimasíðuna, og har kundu teir á leið 14.000 breiðsbandskundarnir í Føroyum – umframt útisetar – eisini sæð sendingarnar, skuldi tað ikki borið til at sæð hesar á sjónvarpsskíggjanum.

### Gav ikki meining

Jógvan Jespersen, stjóri í Kringvarpinum, sigur tó, at tað ikki gav meining fyri teirra viðkomandi at senda til part av hyggjarunum.

- Vit valdu at steðga sendingunum, tí sendinetið var niðri. Vit hava somu skyldu mótvegis øllum okkara kundum, og tí vildu vit ikki koyra eina sending avstað, sum bert partur av hyggjarum okkara kundi tikið ímóti, sigur kringvarpsstjórin um avgerina.

## Óheft av fíggjarligum áhugamálum

Formaðurin í Kringvarpsstýrinum, Rúni Heinesen, varð kunnaður, áðrenn avgerð varð tikin um at strika skránna hjá Kringvarpinum í gjárkvøldið.

Og hann tekur undir við avgerðini hjá Kringvarpsstjóranum.

- Kringvarpið er ein public service stovnur, og tað vilja vit gjarna verða fyri alt fólkið.

- Og hartil er tað eisini okkara skylda, at vit eru óheft av fíggjarligum áhugamálum. Í hesum føri kann tað hugsast, at eksterni veitarin av SvF-signlainum, Televarpið, vildi fingið kappingarfyrimun fram um aðrar veitarar. Og tað er eitt mál, sum Kringvarpið ikki vil dragast uppí, sigur Rúni Heinesen

-mørk

# Antennuskipanin niðurslitin

**Tað var ikki sjálvur sendarin, men eitt brek í antennuskipanini, sum kostaði sjónvarpssignalið í gjár**

SJÓNVARP
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Mest sum í somu løtu, sum Jógvan á Lakjuni varð loystur úr starvi sum landsstýrismaður í mentamálum, fór sjónvarpssignalið til teir hyggjarar, sum ikki móttóku signal umvegis Televarpið ella frá sendaranum í Vørsluni.

Kanska var tað lagnunnar speisemi, tí tað hevur ikki skortað upp á áheitanir frá Kringvarpinum til Mentamálaráðið um at fáa játtan til eina endurnýggjan av sendinetinum.

- Vit hava fleiri ferðir sagt frá, at tað bert var ein spurningur um tíð, áðrenn hetta kundi henda. Tíbetur var tað ikki sjálvur sendarin, sum fór, men hetta er ein støða, sum vit hava ávarað ímóti, sigur Jógvan Jespersen, stjóri í Kringvarpinum.



*Ikki bara sendarin men eisini antennurnar til sendinetið hjá Kringvarpinum eru niðurslitnar. Teknikarar frá Føroya Tele funnið brekið á hesum í gjárkvøldið, og roknað verður við, at Sjónvarpið aftur er á skíggjanum í kvøld*

- Tað er ein mest sum ólukkulig støða, um sendinetið soleiðis verður lagt lamið. Er talan um nýggjan sendara, so kann hesin ikki skiftast frá degi til dags. Og tá skipanin samstundis er soleiðis, at høvuðssendarin føðir alt sendinetið kring landið, gerst trupulleikin enn størri, sigur hann.

Hans Andor Johannesen, tekniskur leiðari hjá Kringvarpinum, sigur, at íløgan í nýggjan sendara verður mett til eina góða millión.

- Hesa ferð var talan tó um brek á antennuskipanini. Hon er eisini nógv slitin, so tað er eisini ein trupulleiki hjá okkum. Men eg dugi ikki at svara uppá, hvussu stór íløgan í nýggja antennuskipan vildi verið, sigur hann.

Teknikarar hjá Føroya Tele leitaðu í alt gjárkvøldið eftir brekinum, og í dag verður arbeitt við at fáa hetta í rættlag. Jógvan Jespersen upplýsir, at starvsfólkini í Sjónvarpinum arbeiða sum vant í dag, og at rokna verður við, at Dagur og Vika aftur verður at síggja á skíggjanum í dag.

### FAKTA

Almennu tølini fyri breiðbandsútreiðslu eru ikki uppgjørd við árslok 2007. Men mett eftir tølunum tann 30. juni í fjør, og eftir teimum tølum, sum Føroya Tele upplýsir við árslok 2007, er talið av breiðsbandskundum á leið 14.000.

Sendinetið hjá Televarpinum dekkar í dag um 94% av Føroyum. Talið av haldarum hjá Televarpinum var við árslok 2007 á leið 7.700 verður upplýst av Televarpinum.

Við verandi marknaðarparti hjá Televarpinum, hevur fyritøkan lógarskyldu til eisini at senda signal frá Sjónvarpi Føroya.

Samanlagt eru á leið 17.550 húsarhald í Føroyum.

Í samgonguskjalinum, sum varð undirskrivað í gjár, stendur millum annað: Sendinetið hjá Kringvarpinum verður endurnýggjað.